Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

# Ársuppgerð og føroyafrádráttur 2016

**Hendan vegleiðingin er frá eini sjálvuppgávu. Á vanligum ársuppgerðum er ikki neyðugt at seta flugubein við ymsu uppæddirnar.**

*\Ársuppgerðina finnur tú á heimasíðuni hjá SKAT – www.skat.dk. Rita inn við NemID ella TastSelv-kodu.\|*

Hevur tú ikki havt frádráttin á tíni forskotsuppgerð, koma teigarnar fyri føroyafrádráttin møguliga ikki fram á ársuppgerðini.

Náddi tú ikki at seta føroyafrádráttin á forskotsuppgerðina fyri 2016, er neyðugt at senda umsókn og skjalprógv fyri, at tú hevur verið lesandi í 2016 til SKAT.

***Sí vegleiðing her: https://www.youtube.com/watch?v=f1r9Jvd59lc***

Fekst tú føroyafrádrátt í 2016, skalt tú vanliga sjálv/ur seta føroyafrádráttin á ársuppgerðina, har skynað verður millum lønarinntøkur í Danmark og úr Føroyum/útlandinum.

**GG**.
Føroyafrádrátturin skal setast inn ymiskt, alt eftir hvørt tú byrjaði at lesa áðrenn ella aftan á 31. desember 2010.

**1.**\|
Trýst á »Ret årsopgørelsen for 2016« og kanna eftir um tølini eru rótt og hvørt føroyafrádrátturin er komin við á ársuppgerðina.




**2.**
Lønarinntøkuna sært tú í teigi 11 undir »**Personlig indkomst, hvoraf der skal betales AM-bidrag**«, - til dømis 31.503 krónur.
Er upphæddin ikki rótt, kanst tú rættað hana ytst fyri upphæddina. Er alt í lagi, setir tú flugubein við upphæddina



**3.**
Legg tær í geyma tína ársinntøku í teigi 11. Føroyafrádrátturin kann nevniliga ikki vera hægri enn tín inntøka.
Trýst á »Vis alle rubrikker« undir »Indkomst og fradrag«.




**4.**
Byrjaði tú at lesa aftan á 31. desember 2010, er frádrátturin hjá tær býttur í tvey: Føroyafrádrátt og Ríkisfelagsskapsfrádrátt.

Skrulla oman til »**Fradrag i personlig indkomst**«
Finn teig 437 »**Fradrag for visse gæstestuderende begyndt efter den 31.12.2010**«
Her setir tú tín føroyafrádrátt, samsvarandi ársinntøkuni – tó í mesta lagi **44.000** kr.




*Fórt tú undir lesnaðin áðrenn 1. januar 2011, skalt tú seta allan frádráttin í teig 491, tó í mesta lagi 71.000 kr.

**5.**
Hevur tú forvunnið meiri enn 44.000 kr. setir tú restupphæddina á teigin fyri ríkisfelagsskapsfráttin.

Skrulla oman til »Ligningsmæssige fradrag«

Finn teig 54 »Fradrag for fiskere, DIS begrænset fart mv.«

*Her setir tú tín ríkisfelagsskapsfrádrátt, samsvarandi ársinntøkuni – tó í mesta lagi **36.000** kr.




*Í ár hevur SKAT sett eina bremsukubba fyri teigin, ið førir við sær, at upphæddin ikki kann vera hægri enn tann, sum tú setti á forskotsuppgerðina fyri 2016. Tørvar tær størri frádrátt, skalt tú venda tær til SKAT.

**6.**
Tá ið tú hevur tryggjað tær, at uppgerðin sær røtt út, skrullar tú oman á botn og trýstir á »**Godkend**«



**Lestrarbyrjan eftir 31. desember 2010**
Skrulla niður á »Fradrag i personlig indkomst«

Finn teigin »Fradrag for visse gæstestuderende begyndt efter 31.12.2010« (437).

Her setir tú tína ársinntøku – tó í mesta lagi 44.000 krónur.

Forvann tú meiri enn 44.000 krónur fyri ári, kanst tú seta upp til 36.000 krónur afturat á teigin fyri Ríkisfelagsskapsfrádrátt.

Skrulla so niður til »Ligningsmæssige fradrag«.

Finn teigin »Fradrag for fiskere, DIS begrænset fart mv.« (419), og set inn upphæddina sum tú forvann afturat teimum 44.000 krónunum – tó í mesta lagi 36.000 krónur.

**Lestrarbyrjan áðrenn 1. januar 2011**
Skrulla niður á »Fradrag i personlig indkomst«

Undir »Fradrag i personlig indkomst« finnur tú teigin »Fradrag for visse gæstestuderende begyndt efter 31.12.2010« (437).

Her setir tú tína ársinntøku – tó í mesta lagi 71.000 krónur.

**Inntøkur úr Føroyum/útlandinum**
Hevur tú havt inntøku úr Føroyum/uttanlands í 2016, skal hon uppgevast í Danmark. Tó er bert neyðugt at upplýsa inntøku úr Føroyum/útlandinum, sum tú hevur fingið *eftir*, at tú flutti til Danmarkar.

Skrulla oman til »Udenlandsk indkomst«, og trýst á »vis«.

Set inn landið, ið tú hevur fingið inntøku frá í teig 401.

Undir »Lønindkomst«, finnur setur tú inn inntøkuna, sum tú hevur forvunnið úr Føroyum/útlandinum fyri 2016, síðani tú flutti til Danmarkar.

Í ávikavist start- og slutdato setir tú dagfestinginar fyri fyrsta og síðsta lønarútgjaldingardag frá útlandinum í 2016.

Í teig 495L »betalt udenlandsskat« setir tú goldnan skatt inn, um tú hevur goldið skatt í Føroyum/útlandinum.

Síðani skrullar tú oman á botn og trýstir á »Godkend«.

**GG.**
Ynskir tú føroyafrádráttin at fevna um uttanlandsinntøkuna, skalt tú senda SKAT umsókn um hetta – eisini um tú frammanundan hevur fingið Føroyafrádráttin.

*Sí vegleiðing at søkja um føroyafrádrátt til uttanlandsinntøku her. http://radgevingin.dk/wp-content/uploads/2016/03/Umsókn-u-ff.pdf*

*Sí vegleiðing at søkja føroyafrádrátt at fevna um uttanlandsinntøkuna, um tú frammanundan hevur fingið føroyafrádrátt her.http://radgevingin.dk/wp-content/uploads/2016/03/Veglei%C3%B0ing-til-*

*umso%CC%81kn.pdf*

***Minst til at broytingar í ársuppgerðini skulu verða inni í seinasta lagi 1. mai 2017.***

***Viðvíkjandi 'Udvidet Selvangivelse' og 'udenlandsk indkomst' er freistin 1. juli 2017.***